Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS

# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 20. APRÍL 2010

# ÁRSFRÁGREIÐING 2009

## Frágreiðing frá nevndini

Føroyska framleiðslan av laksi og sílum var í 2009 umleið 59.000 tons í rundari vekt, harav 7.600 tons av sílum. Hetta er 6.000 tons meira enn seinasta ár. Komandi árini verður mett, at tøkan av alifiski helst vil økja umleið 5% um árið. Tó verður tøkan í 2010 nakað minni enn í 2009, grunda á at biomassin av fiski í sjónum á nýggjárinum var heldur lægri enn um ársskifti 2008/2009.

Karmarnir um alivinnuna eru yvirhøvur góðir, og vinnan hevur seinasta árið víst góð úrslit, tá tað kemur til vøkstur og felli, og eingir sjúkutilburðir hava verið. Saman við nøktandi marknaðarprísum hevur hetta gjørt, at alivinnan hevði góð fíggjarlig úrslit í 2009.

Trupulleikar hava verið við lús í Sundalagnum síðan seinasta summar. Alivinnan hevur arbeitt miðvíst við hesum og hava alarar í Sundalagnum gjørt avtalu um, at Sundalagið skal tømast fyri fisk, hetta fyri at bróta ringrásina hjá lúsini. Roknað verður við, at allur fiskurin er tikin tíðliga í summar. Við hesum átaki verður roknað við, at stóru trupulleikarnir við lús ikki fara at taka seg upp aftur, tá smolt verða sett útaftur.

Roknað verður við, at útboðið av laksi á marknaðinum í Evropa og í heiminum sum heild, verður minni í 2010 enn undanfarin ár, orsaka av sjúkustøðuni í Kili. Marknaðarprísurin á alifiski er í løtuni góður, og er tað tí sera týdningarmikið, at alivinnan fær konsolidera seg, soleiðis at nakað er at standa ímóti við til komandi tíðir. Alisøgan sigur frá, at laksaprísurin sveiggjar sera nógv, og tað hava verið longri tíðarskeið har ikki ber til at forvinna pening orsaka av, at marknaðarprísirnir hava verið langt undir framleiðsluprísinum.

Í 2009 vórðu umleið 10 mió. fiskar settir á sjógv og roknað verður við, at í 2010 verða 12 mió. fiskar settir út. Vøksturin í framleiðsluni komandi árini verður ikki líka stórur sum undanfarin ár, men roknað verður við einum vøkstri á 5% um árið.

Týdningarmestu málini, sum nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur arbeitt við í 2009 eru m.a. tann miðvísa herferðin, sum almennir myndugleikar hava ført ímóti alivinnuni, við alsamt at leggja fleiri gjøld á vinnuna, umframt at hækka verandi gjøld. Harumframt hevur felagið arbeitt við kunngerðini um yvirvøku og tálming av lús, avleiðingunum av stongslinum av russiska marknaðinum fyri føroyskar fiskavørur, fyrireika aðalfundin hjá evropeiska alarafelagnum, sum var í Føroyum í 2009, árligu aliráðstevnuni og fingið gongd á verkætlan um, at marknaðarføra føroyskan alifisk.

Viðvíkjandi áleggingini av gjøldum á alivinnuna hevur Havbúnaðarfelagið ført fram, at alivinnan kann góðtaka at gjalda fyri eftirlit frá tí almenna, men krevur, at gjøgnumskygni er í mátanum gjøldini verða áløgd. Nevndin heldur, at tilvild ræður, tá gjøld verða áløgd vinnuni, og at almenna umsitingin ikki fylgir egnum ásetingum um, hvussu hetta skal gerast. Havbúnaðarfelagið eftirlýsir ein dialog við myndugleikarnar um, hvussu og hvat fyri eftirlit verður framt, so hetta ikki verður nýtt til, at almenna umsitingin veksur enn meira. Vandi er fyri, at kappingarevnini hjá føroysku alivinnuni er í vanda. Orsaka av geografiskari plasering hava føroyskar fyritøkur m.a. størri útreiðslur av flutningi til marknaðin enn kappingarneytarnir, og førdi politikkurin har vinnan fær álagt gjøld av øllum handa slagi, økir um munin á fortreytunum hjá føroysku alivinnuni í mun til kappingarneytarnar.

21. des 2009 kom kunngerð í gildi fyri yvirvøku og tálming av lús. Í hesum sambandi hevur tað verið stórt virksemi í felagnum við hoyring av kunngerðini og tilhoyrandi vegleiðing. Havbúnaðarfelagið tekur undir við, at økið verður regulerað.

Viðvíkjandi stongslinum frá russiska marknaðinum, hevur Havbúnaðarfelagið arbeitt við at fáa liðiligari mannagongdir í sambandi við útflutningin. Avtalan, sum varð gjørd millum føroyskar og russiskar myndugleikar, tá marknaðarliðini opnaðu aftur, vísti seg at verða lítið arbeiðslig fyri alivinnuna. Ávís framstig eru gjørd á hesum økinum, men tað er framvegis tungt at fáast við útflutning til Russlands.

Í 2009 hevur evropeiska alarafelagið FEAP havt aðalfund í Føroyum. Havbúnaðarfelagið fyrireikaði fundin og nýtti høvi at vísa fram føroysku alivinnuna.

# Innihaldsyvirlit

1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ..... 4

2. ALMENT UM GONGDINA INNAN ALIVINNUNA ..... 5

1.1 FRAMLEIÐSLA ..... 6
1.2 ÚTFLUTNINGUR ..... 8
1.3 PRÍSIR ..... 9
1.4 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI ..... 10
1.5 BÝTIÐ SEINASTU FÝRA ÁRINI ..... 11
1.6 ÚTSETING AV SMOLTI ..... 12
1.7 ALING AV TOSKI ..... 13

2. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ..... 14

2.1 EVROPEISKA ALARAFELAGIÐ HAVT AÐALFUND Í FØROYUM ..... 14
2.2 GJØLD Á ALIVINNUNA ..... 14
2.3 ALIRÁÐSTEVNAN 2010 ..... 15
2.4 ALISØGAN ..... 15
2.5 FØROYSKUR FISKUR ÚTIHÝSTUR AV RUSSISKA MARKNAÐINUM ..... 16
2.6 GRANSKING INNAN ALING ..... 16
2.7 GAGNLIGASTA TILGONGDIN HJÁ FØROYUM Í MUN TIL ES ..... 17
2.8 SALMON FROM FAROE ISLAND ..... 17

3. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ..... 18

3.1 RAKSTRARKUNNGERÐIN ..... 18
3.2 KUNNGERÐ UM YVIRVØKU OG TÁLMING AV LÚS ..... 18
3.3 KUNNGERÐ UM KAVARAVIRKSEMI ..... 18

# 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá alivinnuni, bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:

Nevndarlimir:
Atli Gregersen, Luna
Bogi Jacobsen, Viking Seafood
Erhard Joensen, Faroe Farming
Ragnar Joensen, Marine Harvest
Regin Jacobsen, Bakkafrost

Eykalimur:
Odd Eliasen, Havsbrún

## 2. Alment um gongdina innan alivinnuna

Alivinnan er væl fyri og úrslitini seinastu árini hava verið góð. Seinastu árini hava verið seks feløg, sum hava rikið alivirksemi í Føroyum, men við ársskifti 2009/2010 komu Vestlax og Faroe Salmon í sama alisamtak. Karmarnir um alivinnuna eru góðir og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslustýring er.

Bygt á góðar karmar og nærlagni, er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur, tí fiskurin veksur væl og hevur sera lágt fellið, samanborið við størstu kappingarneytarnar í Noregi og Kili. Hetta saman við góðum marknaðarprísum hevur gjørt, at alivinnan hevur nøktandi avkast í 2009.

Meðan framleiðslan í 2006 og 2007 var eyðkend fyri, at sera lítið var av fiski, var framleidda nøgdin av laksi og sílum í 2008 og 2009 vaksin til ávíkavist 47.000 tons og knøpp 60.000 tons í rundari vekt. Marknaðarprísurin á laksi hevur hildið sær væl seinnu árini og 2009 var ikki undantak í so máta. Samlaða útflutningsvirðið frá alivinnuni í 2009 var góðar 1,3 mia kr.

Samanumtikið hevur 2009 eins og 2008 verið eitt gott ár og sigast kann, at alivinnan er komin uppaftur á eina burðardygga og stabila framleiðslunøgd. Í 2010 verður mett, at tøkan verður nakað minni enn í 2009 ella á leið 45.000 tons.

Í 2007 og 2008 øktist útboðið av laksi á evropeiska marknaðinum og tað var eitt ávíst trýst á laksaprísinum. Lági kursurin á norsku krónuni gjørdi, at laksaprísurin til føroyska alaran eitt tíðarskeið, seint í 2008 og fyrru helvt av 2009, var undir trýsti, men seinnu helvt av 2009 hevur prísurin verið góður, samstundis sum norska krónan hevur styrkt seg nakað aftur. Marknaðarprísurin er síðani hækkaður aftur, samstundis sum kursurin á norsku krónuni eisini er hækkaður nakað aftur.

Hvørji útlitini eru er torført at meta um, tí búskaparkreppan, sum er um allan heim, hevur ikki slept takinum enn. Ábendingar eru um, at tað gongur heldur frægari í USA og Evropa, men tað er enn ov tíðliga at gera endaliga niðurstøðu um hetta. Laksaprísurin hevur hildið sær munandi betri seinasta hálvtannað árið enn marknaðarprísurin á øðrum fiskasløgum. Orsøkin er helst, at framleiðslan av alifiski í Kili er minkað munandi orsaka av sjúkutrupuleikum. Kili kemur helst fyri seg aftur í 2012/2013, og tá verður roknað við, at prísurin á alifiski ferð at stabilisera seg á eitt meira vanligt støðið. Alisøgan sigur frá, at prísurin kann sveiggja sera nógv, men roknað verður við, at um alarar hava ein

burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan er áleiðis til at hava góðar karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað eru hend stór framstig á hesum økinum og tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir alsamt arbeiða við at gera hesar karmar enn betri.

Seinasta árið hevur ein trupulleiki verið við lús í Sundalagnum. Alivinnan saman við Fiskaaling og myndugleikunum hevur arbeitt miðvíst við hesi avbjóðing og mett verður at støðan í løtuni er rættuliga góð. Arbeitt verður við at tøma Sundalagið fyri fisk nú í vár, og tá verður økið eisini braklagt, sum ásett í rakstrarkunngerðini. Ætlanin er síðani at seta fisk útaftur og ætlanin er framyvir at reka Kaldbaksfjørð og Sundalagið sum eitt aliøki.

Seinastu árini eru royndir gjørdar við at ala tosk. Fiskaaling framleiddi toskayngul og tvær alifyritøkur settu tosk út til framleiðslu. Fiskurin var liðugt tikin í 2009 og samanumtikið kann sigast, at framleiðslan gekk væl. Fiskurin vaks serstakliga gott og munandi betri enn toskur hjá okkara kappingarneytum. Lønsemi í framleiðsluni hevur tó ikki verið nøktandi og fallandi marknaðarprísir hava gjørt sítt til, at henda aling ikki er lønsom. Toskayngul verður ikki sett út í 2010.

## 1.1 Framleiðsla

Framleiðslan í alivinnuni vaks nógv frá 1999 til 2003 fyri síðani at minka fram til 2007. Í 2008 og 2009 er tøkan komin uppaftur á 2003 støði og roknað verður við, at framleiðslan næstu árini vil økja eini 5% um árið. Tøkan í 2009 var góð, 51.000 tons av laksi og 7.600 tons av sílum í livandi vekt.

Mynd 1. Tøka av alifiski fram til 2009 (livandi vekt)




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,915 | 1,44 | 1,26 | 3,292 | 1,315 | 3,335 | 11,149 | 10,22 | 5,092 | 4,493 | 5,496 | 7,648 | 8,943 | 7,645 |
| Laksur | 17,663 | 20,306 | 19,176 | 39,252 | 33,508 | 53,557 | 44,954 | 61,63 | 40,985 | 18,962 | 13,078 | 22,305 | 38,494 | 51,214 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Út frá metingini av tøkuni av laksi og sílum í ár, sum er grundað á útsetingar av smolti í 2008 og 2009, verður mett, at tøkan í 2010 verður umleið 44.500 tons í livandi vekt av laksi og 2.100 tons av sílum. Í 2010 verða síl ikki sett út aftur og tískil verður ikki tøka av sílum komandi árini.

Verður hugt eftir nøgdina av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku, sæst hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið.

Mynd 2 Tøka av alifiski viku fyri viku í 2009




Kelda: Havbúnaðarfelagið

Ábendingar eru um, at talið av smolti, sum verður sett á sjógv í ár, fer at liggja á umleið 12-13 mió. stk. Við tí bygnaði, sum er í alivinnuni í dag og teimum kørmum, sum eru lagdir, verður roknað við, at framleiðslan av alifiski kann økja eini 5% um árið komandi árini.

## 1.2 Útflutningur

Mynd 3. Útflutningur av alifiski í virði frá 2003 til 2009 (1000 kr)




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 3 vísir, at útflutningsvirðið á alifiski var í 2003 knappa milliard. Frá 2004 til 2006 minkaði útflutningsvirðið niðurum hálvu milliardina, fyri síðani at taka seg uppaftur ár fyri ár fram til og við 2009. Í 2009 var útflutningsvirði knappa 1,4 milliard krónur. Prísurin á alifiski, serliga í seinnu helvt av 2009, hevur verið sera góður og serliga er tað amerikanski marknaðurin, sum hevur gjørt munin, eftir at útflutningurin nærum steðgaði til Russlands, orsaka av stongslinum av føroyskum vørum frá russiska marknaðinum. Útlitini komandi tíðina verða mett at verða hampuliga góð, tó so at óvissur eru. Framleiðslan hjá Kili er framvegis lág og ávirkar hetta marknaðin. USA eftirspyr stórum nøgdum av alifiski og er eitt ávíst skifti farið fram millum marknaðin í Evropa og USA.

Fíggjarkreppan, sum er vorðin búskaparkreppa í nærum øllum heiminum, ávirkar eftirspurningin og prísleguna á flestu vørum. Hvussu tað verður við laksinum er sera spennandi, men enn sær ikki út til, at eftirspurningurin og sostatt prísstøði á laksi er ávirkað av støðuni. Ábendingar eru um, at heimsbúskapurin er við at venda, men tað er tó enn sera torført at spáa um fíggjarligu útlitini komandi árini, tí óvissan er stór.

Føroyski útflutningurin av alifiski er bygdur á eina alivinnu, sum virkar innan fyri sera góðar karmar. Hesir karmar vóru lagdir, meðan alivinnan var í kreppu, og vóru við til at fáa áhugan hjá íleggjarum at gera íløgur aftur í alivinnuna. Alarar eru í dag nærlagdir og hava ein skynsaman rakstur, har umhvørvisvernd og sjúkufyribyrging eru sett í

hásæti. Útflutningurin er tí bygdur á eina burðardygga alivinnu, har vágin fyri sjúku og vánaligum rakstri er neyvt stýrdur.

Marknaðaratgongd er tó framvegis ein avbjóðing hjá alivinnuni. Tollforðingin, sum hevur verið á føroyskum sílum á ES marknaðinum, var tikin aftur fyri hálvumøðrum árið síðani, men undan hesum avgjørdi alivinnan ikki at fáast við sílaframleiðslu. Í 2008 varð alivinnan stongd úti av russiska marknaðinum, men marknaðurin opnaði aftur í 2009. Ein slíkur stongsil frá einum marknaði hevur serstakliga stóra ávirkan á vinnuna, og alt eigur at gerast fyri ikki at koma í slíka støðu aftur. Tað hevur alstóran týdning fyri vinnuna, at føroyskir myndugleikar alsamt arbeiða við og tryggja, at marknaðaratgongdin fyri alifisk er so góð sum gjørligt.

## 1.3 Prísir

Marknaðarprísurin hevur stóra ávirkan á avrikið hjá alivinnuni, tí hann sveiggjar sera nógv. Mynd 4 vísir ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1993 til 2009. Sum myndin vísir, eru umleið 6 ár millum prístindar og prísgjáir, undantak tó fyri 2009, sum fyrst og fremst skyldast, at útboðið av alifiski á heimsmarknaðinum er fallið sera nógv orsaka av kreppuni í Kili. Prístindar hava verið í 1994, 2000 og 2006, meðan prísgjáir vóru í 1997 og 2003.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini er nógv tengt at, í hvønn mun og hvussu skjótt kilenska framleiðslan av alifiski kemur uppaftur á sama støðið, sum framleiðslan var á fyri nøkrum árum síðani. Metingar vísa, at í 2012/2013 kann væntast, at kilenska framleiðslan helst hevur stabiliserað seg aftur.

Mynd 4. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi. FOB Føroyar




| | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 29,59 | 29,40 | 28,90 | 23,05 | 22,57 | 20,98 | 23,76 | 28,32 | 19,95 | 19,49 | 16,35 | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,60 | 24,13 | 27,94 |

Kelda: Hagstova Føroya

Prísurin á feskum kruvdum laksi var í 2000 góðar 28 kr/kg og fall til 16,35 kr/kg í 2003. Prísurin hevur síðani hækkað á hvørjum ári til 2008, tá hann aftur lækkaði til 24,13 kr í miðal pr. kg. Í 2009 var miðalprísurin á feskum laksi 27,94 kr/kg.

Mynd 5. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaportiónum.




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 5 vísir meðalprísin á frystum laksaportiónum frá 2003, tá framleiðslan veruliga tók dik á seg fram til 2007. Prísurin á laksaportiónum sveiggjar eisini, men er væl meira støðugur enn prísurin á feskum laksi. Prísurin hevur ligið rættiliga støðugur omanfyri 50 kr/kg, men hevur onkur tíðarskeið dottið líka niður um. Miðalprísurin í 2006 var hægsti nakrantíð nevniliga 68,45 kr/kg. Í 2009 var miðalprísurin 53,69 kr fyri laksaportiónir.

## 1.4 Býtið av útflutningi

Mynd 6 vísir býtið av útflutninginum í virði. Feskur laksur hevur verið sera dominerandi partur av útflutninginum, men í 2006 kom broyting í, tá laksaportiónir vístu seg at økja um sín part av útflutninginum. Feski laksurin er tó framvegis dominerandi í útflutninginum. Í 2007 táttaði útflutningsvirðið frá alivinnuni í góðar 600 mió. kr. fyri síðani í 2008 at verða góðar 900 mió. kr. Í 2009 var útflutningsvirðið knappar 1,4 milliard krónur. Í 2010 verður roknað við at útflutningsvirðið av alifiski fer at verða umleið 1 milliard kr.

Mynd 6. Útflutningsbýtið av alifiski í virðið




Kelda: Hagstova Føroya

Útflutningsvirðið á laksaportiónum, hevur víst seg at vera sera javnt øll árini og roknað verður við, at útflutningsvirðið fyri laksaportiónir ferð at vaksa nakað afturat komandi ár, tí framleiðsluorkan er vaksin.

## 1.5 Býtið seinastu fýra árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit fyri útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Fráskurður o.a. er ikki við. Tølini eru fyri seinastu sjey árini.

Talva 1. Útflutningsvirði fyri ymsu vørurnar frá 2003 til 2009

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 532.620 | 424.299 | 206.522 | 134.650 | 254.581 | 543.851 | 795.854 |
| Frystur laksur | 39.170 | 69.632 | 53.660 | 32.573 | 55.274 | 40.826 | 68.587 |
| Laksaportiónir | 224.297 | 184.324 | 169.967 | 195.024 | 171.806 | 212.298 | 303.505 |
| Laksur, annað | 8.211 | 6.731 | 9.703 | 12.074 | 11.000 | 19.927 | 34.703 |
| Fesk síl | 4.074 | 447 | 484 | 34.657 | 14.043 | 13.814 | 48.320 |
| Fryst síl | 155.353 | 76.547 | 58.190 | 64.034 | 86.730 | 123.847 | 123.149 |
| Síl, annað | 485 | 372 | 0 | 168 | 0 | 73 | 3.613 |
| **Útflutningsvirði tilsamans** | **964.209** | **762.351** | **498.526** | **473.178** | **593.434** | **954.636** | **1.377.730** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar í 1000 tonsum

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 32.581 | 23.312 | 9.330 | 4.514 | 10.347 | 22.542 | 28.486 |
| Frystur laksur | 2.050 | 3.509 | 2.374 | 1.073 | 2.087 | 1.598 | 2.587 |
| Laksaportiónir | 4.423 | 3.870 | 3.104 | 2.849 | 2.978 | 4.177 | 5.653 |
| Laksur, annað | 630 | 479 | 736 | 1.131 | 1.400 | 2.549 | 3.835 |
| Fesk síl | 281 | 21 | 19 | 1.302 | 637 | 644 | 2.059 |
| Fryst síl | 7.680 | 3.607 | 2.802 | 2.302 | 3.864 | 5.558 | 4.970 |
| **Tilsamans** | **47.644** | **34.797** | **18.364** | **13.172** | **21.313** | **37.068** | **47.588** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar pr. kg.

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 16,35 | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,60 | 24,13 | 27,94 |
| Frystur laksur | 19,11 | 19,84 | 22,61 | 30,36 | 26,49 | 25,55 | 26,52 |
| Laksaportiónir | 50,72 | 47,63 | 54,76 | 68,45 | 57,69 | 50,82 | 53,69 |
| Fesk síl | 14,50 | 21,29 | 25,47 | 26,62 | 22,06 | 21,45 | 23,47 |
| Fryst síl | 20,23 | 21,22 | 20,77 | 27,81 | 22,45 | 22,28 | 24,78 |

Kelda: Hagstova Føroya

Sum talvurnar vísa so eru bæði nøgdin og útflutningsvirðið av vørum frá alivinnuni voksin seinasta árið. Verður hugt eftir gongdini í miðalprísinum á ymisku vørunum sæst, at miðalprísurin á øllum vørum er fallin munandi í mun til 2006, sum var eitt sera gott ár. Í 2009 hevur hesin munur tó javnað seg nakað aftur.

## 1.6 Útseting av smolti

Mynd 7 vísir útsetingina av laksi og sílum frá 2006 til 2009 og framskriving fyri 2010. Myndin vísir, at útsetingin av fiski, seinastu árini er vaksin frá umleið 9 mió. stk. til knøpp 11 mió. smolt í 2009. Í 2010 verður mett, at umleið 12 mió. smolt verða sett út. Í 2007 vóru omanfyri tvær mió. síl sett út og í 2008 verður talið 1,54 mió. Í 2009 vóru minni enn 1mió. síl sett út og í 2010 verða síl ikki sett út.

Mynd 7. Útseting av laksi og sílum frá 2006 til 2009 og meting fyri 2010




## 1.7 Aling av toski

Seinastu árini eru royndir gjørdar við toskaaling í Føroyum, og eru úrslitini sera áhugaverd, tá ið samanborið verður við toskaaling í grannalondunum. Hildið verður, at tað serliga er javna hitalagið kring oyggjarnar, sum ger toskaaling í Føroyum áhugaverda.

Fiskaaling hevur gjørt royndir við framleiðslu av toskayngli í Nesvík, og okkurt árið hevur gingið hampiligt, men staðfestast má, at startfóðring við náttúruligum æti í posum er sera ótrygg. Eisini hevur Fiskaaling eina PhD-verkætlan, sum skal samanbera genetiskar eginleikar og vakstrareginleikar hjá toski av Føroya Banka og toski av Landgrunninum.

Í Árnafirði hevur Bakkafrost Farming North gjørt royndir at ala tosk fram til tøku. Lívfrøðiliga eru úrslitini sera lovandi við góðum vøkstri og lítlari kynsbúning. Í Hvalba hevur FaroeCod royndir við toskaaling í resirkulering á landi. Eisini hendan verkætlanin er sera áhugaverd.

Fyribils eru ætlanirnar at ala tosk lagdar á hillina, tí nógvir trupulleikar skulu loysast áðrenn trygt grundarlag fæst fyri toskaaling, og nú prísurin er nógv fallin, er trupult at fáa lønsemi í raksturin.

# 2. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

## 2.1 Evropeiska alarafelagið havt aðalfund í Føroyum

26. til 30. mai 2009 hevði evropeiska alarafelagið, sum Havbúnaðarfelagið eisini er limur í, aðalfund í Føroyum. Havbúnaðarfelagið var vertur fyri fundinum og fíggjaði eisini stóran part av tiltakinum.

Fundurin var skipaður soleiðis, at fyrsta dagin var vitjað á smoltstøðini hjá Marine Harvest í Oyndarfirði og á alibrúkinum hjá Marine Harvest Undir Síðu í Kollafirði. Útferðin var løgd soleiðis til rættis, at gestirnir eisini fingu sæð ein part av Føroyum, so koyrt var umvegis Gjógv og Sundalagið aftur til Havnar. Tveir dagar vóru við fundarvirksemi á Hotel Føroyum, har FEAP kunnaði um hvat fyriferst í Evropa viðvíkjandi alivinnu. Seinasta kvøldið var veitsludøgurði í Norðurlandahúsinum har gestirnir fingu høvi at síggja part av føroyskari mentan, umframt fingu ein góðan bita.

Tiltakið var sum heild væleydnað. Nevndin er samd um, at tað er týdningarmikið framhaldandi at fylgja við í FEAP, og at tað er kontinuitetur í luttøkuni hjá felagnum.

Í oktober 2009 luttók Havbúnaðarfelagið á seinna ársfundinum hjá FEAP í Helsinki í Finlandi.

## 2.2 Gjøld á alivinnuna

Seinasta árið hevur rættulig herferð verið ímóti alivinnuni. Alivinnan er áløgd gjøld fyri allar tænastur, sum vinnan fær frá myndugleikunum og í 2009 eru hesi gjøld munandi økt. Hetta er bæði fyri vetrinera eftiransing, fyri yvirvøku av heilivágsleivdum umframt kostnaðin fyri umhvørviseftiransing. Seint í vár var uppskot frammi um, at alivinnan harumframt skuldi gjalda víddargjald. Víddargjaldið skuldi roknast at verða ein sokallað tilfeingisrenta.
Havbúnaðarfelagið metir ikki, at alivinna er tilfeingisvinna. Alivinna er framleiðsluvinna – har fiskurin verður framleiddur frá rognum og fram til tøku, slátraður og útfluttur.

Havbúnaðarfelagið hevur brúkt nógva orku uppá hesi mál í 2009 og nevndin er samd um, at alivinnan kann átaka sær at gjalda fyri tænastur frá tí almenna, men tað má verða skil á, hvussu hesi gjøld eru ásett, soleiðis at vinnugreinin ikki fær størri kostnaðir álagdar enn veruligu útreiðslurnar eru av tænastunum. Havbúnaðarfelagið metir, at ávís gjøld verða kravd, sum eru rættuliga langt omanfyri veruliga kostnaðin av

teimum tænastum, sum gjøldini skulu dekka. Enn hevur Havbúnaðarfelagið ikki sæð skjalprógv fyri, at gjøldini verða ásett út frá kostprísunum fyri tænasturnar, soleiðis sum er ásett í játtanarlóg landsstýrisins. Fundur hevur verið við avvarðandi aðalráð um spurningin, og har er gjørt greitt, at landsstýrisfólkini vilja hava, at gjøldini verða ásett soleiðis, at tey dekkað kostnaðin av tænastuni.

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum heldur eisini, at tað ikki ber til, at alivinnuni verður álagt tilfeingisgjald, økisgjøld og líknandi, so leingi sum aðrar vinnugreinar fáa studning úr almenna kassanum. Kostnaðarstøðið í alivinnuni er ávirkað av, at studningur verður latin til aðrar vinnugreinar og er tað órímiligt, at alivinnan skal gjalda, meðan aðrar vinnur fáa studning. Somuleiðis er tað umráðandi, at føroyska alivinnan framhaldandi hevur góðar karmar at skipa vinnuna á einum kappingarførum grundarlagi. Havbúnaðarfelagið metir at eitt tilfeingisgjald vil vera við til, at gera at kappingarføri hjá føroysku alivinnuni versnar í mun til aðrar alitjóðir.

Í hesum sambandi hevði nevndin í Havbúnaðarfelagnum fundir við allar flokkar á løgtingið og greiddi frá sjónarmiðum felagsins. Hetta loysti seg, tí ætlanirnar um at áleggja alivinnuni víddargjald, varð fyribils slept.

## 2.3 Aliráðstevnan 2010

Fjórða árið á rað hevur Havbúnaðarfelagið skipað fyri aliráðstevnu. Aliráðstevnan er vorðin ein fastur táttur, í tí virksemi Havbúnaðarfelagið hevur valt at leggja dent á. Orsøkin er einføld. Nevndin í felagnum ynskir at førleikamenna starvsfólkið í vinnuni og hetta er aðalmálið við teimum fyrilestrum, sum verða fyriskipaðir á aliráðstevnuni.

Á aliráðstevnuni 2010 vóru 226 fólk til ráðstevnuna og 174 fólk til veitsluna, sum var um kvøldið. Av hesum vóru 2/3 starvsfólk frá alivinnuni.

## 2.4 Alisøgan

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur gjørt av at heita á Helga Jacobsen um at kanna og fáa til vega tilfar, sum er til um alivinnuna. Helgi byrjaði uppá arbeiðið 1. februar í ár og roknað verður við, at hann verður liðugur við arbeiði at finna tilfar og gera eina meting av, um tað er nokk av tilfari til at skriva alisøguna í endanum av mai. Um tað vísir seg at verða nokk av tilfari tøkt, tekur nevndin í Havbúnaðarfelagnum støðu til, um farast skal víðari við at skriva og útgeva bók.

## 2.5 Føroyskur fiskur útihýstur av russiska marknaðinum

Í september 2008 var føroyskur fiskur útihýstur av russiska marknaðinum. Hetta var sera óheppið fyri føroysku alivinnuna og Havbúnaðarfelagið hevur lagt stóra orku í at samstarva við myndugleikarnar um at fáa opna upp aftur fyri útflutninginum til Russland. Á summri í 2009 opnaði marknaðurin aftur, eftir at Føroyar og Russland skrivaðu undir avtalu um, hvussu samstarvið skuldi skipast framyvir.

Eftir at útflutningurin til Russlands tók seg uppaftur hevur tað víst seg at vera sera trupult at útflyta feska vøru til Russlands, orsaka av at tað er eitt krav frá russum at vøran skal verða seglað í bingju í Føroyum. Ein loysn er funnin á hesum og komandi tíðina fáa vit at síggja, hvussu hendan skipan roynist og um útflutningurin av feskum vørum til Russlands tekur seg uppaftur.

## 2.6 Gransking innan aling

Fiskaaling hevur umlagt sítt virksemi frá at verða framleiðari av rognum og smolti til alivinnuna til ein granskingarstovn. Fiskaaling hevur fleiri verkætlanir á skránni, sum eru áhugaverdar fyri alivinnuna. Hetta eru m.a. verkætlanin innan:

- Vatngóðsku innan aling á sjónum
- Gróður á alinótum
- Lúsateljingar og resistenskanningar
- Spjaðing av laksalús
- Menning innan framleiðslu av toskayngli og toskaaling
- Ávirkan av kynbótaarbeiðið á ílegurnar hjá toski osv

Somuleiðis er Fiskaaling við í verkætlan har kannað verður, hvussu streymviðurskiftini eru á føroysku firðunum. Henda verkætlan verður gjørd í samstarvi við Náttúruvísindadeildina á Setrinum og alivinnuna.

Aðrar granskingarverkætlanir, sum eru ella fara í gongd eru:

- Aling eystanfyri Nólsoynna
- Optimering av laksaframleiðsluni (luttøka í norskari verkætlan)
- Nakrar verkætlanir innan tosk, serliga um framleiðslu av yngli
- Betri matvørugóðska á aldum fiski
- Fiskaheilsa og aliumhvørvið

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum fegnast um, at alt fleiri granskingarverkætlanir koma í gongd, sum hava beinleiðis relevans fyri alivinnuna. Tað er umráðandi, at møguleikarnir á føroysku firðunum verða gagnnýttir optimalt og tað kunnu hesar verkætlanir verða við til at lýsa.

## 2.7 Gagnligasta tilgongdin hjá Føroyum í mun til ES

Í sambandi við at Føroya Arbeiðsgevarafelag er umboðað í einum arbeiðsbólki, sum skal útgreina, hvørjir møguleikar eru fyri, at Føroyar kann fáa tættari tilknýtið til ES, hevur Arbeiðsgevarafelagið heitt á vinnugreinafeløg, harímillum Havbúnaðarfelagið, um at umrøða hetta út frá alivinnunar sjónarmiði.

Havbúnaðarfelagið hevur í fleiri umførum víst á, at Føroyar eiga at gerast limur í ES og er henda støða óbroytt. Sjónarmiðið er grundað á, at marknaðaratgongd til ES marknaðin er altumráðandi fyri alivinnuna. Føroyska alivinnan er fyrr ákærd fyri at dumpa laks inn á ES marknaðin og eru slík dumpingmál ógvuliga kostnaðarmikil og ikki minst sera torfør at koma í holt við. Havbúnaðarfelagið metur, at tað hevði verið ein vanlagna um føroyska alivinnan aftur varð ákærd fyri dumping.

## 2.8 Salmon from Faroe Island

Havbúnaðarfelagið hevur gjørt av at gera eitt átak fyri at marknaðarføra føroysku alivinnuna. Avtala er gjørd við Árni Olsen, sum hevur lisið og arbeitt innan marknaðarføring, um at gera eitt átak fyri at marknaðarføra føroysku alivinnuna. Kappingarneytar okkara í Noregi og Skotlandi hava felagsskapir, sum nýta hundraðtals milliónir av krónum um árið til at marknaðarføra alivinnuna við. Í Føroyum er lítið gjørt við hetta. Havbúnaðarfelagið hevur tí avgjørt at seta gongd á verkætlan har m.a. arbeitt verður við at fáa føroysku alivinnuni ein felags samleika og gera felags marknaðarføringstilfar, herundir heimasíðu.

Arbeiðið er farið í gongd og til heystar verður eftirmeting gjørd av hesum.

## 3. Lógir og kunngerðir

Í 2009/2010 eru fleiri lógir og kunngerðir komnar. Í seinastu ársfrágreiðing var málið viðvíkjandi nýggju alilógini lýst og seinasta árið hevur alivinnan livað við nýggju lógini.

### 3.1 Rakstrarkunngerðin

Nýggj rakstrarkunngerð var eisini umrødd í seinastu ársfrágreiðing og hevur alivinnan seinasta árið fingið roynt kunngerðina. Kunngerðin fevnir nú um alt alivirksemi og krøvini til rapportering frá alivinnuni eru munandi økt. Í hesum sambandi gjørdi Havbúnaðarfelagið íløgu í at fáa gjørt eitt rapporteringsmodul til FarmControll, fyri at lætta um rapporteringina frá alifeløgunum til myndugleikarnar.

### 3.2 Kunngerð um yvirvøku og tálming av lús

Í 2009 kom ein kunngerð um yvirvøku og tálming av lús. Havbúnaðarfelagið tekur undir við, at hetta øki nú eisini er regulerað. Havbúnaðarfelagið heldur tó, at tað er umráðandi, at dagføring av kunngerðini verður gjørd, tá hon er roynd eitt ár ella so. Fyrst í 2010 kom vegleiðing til kunngerðina um yvirvøku og tálming av lús til hoyringar og gjørdi Havbúnaðarfelagið viðmerkingar til vegleiðingina.

### 3.3 Kunngerð um kavaravirksemi

Í 2009 komu eisini kunngerðir um kavaravirksemi. Havbúnaðarfelagið heldur, at tað er sera týdningarmikið, at trygdin er í lagi, og at trygdin hjá kavarum er eitt øki, sum ikki hevur verið raðfest. Tað er gott at fáa krøv til atburð fyri kavaravinnuna, tí hetta vil professionalisera vinnugreinina og skapa vissu fyri, at kavaravirksemið fer fram á tryggan hátt.